# Suðuroyingar vilja hava meir

**Tað er longu nú greitt, at bussførararnir í Suðuroynni góðtaka ikki sáttmálan, sum Strandferðslan og Bussfelagið blivu samd um fríggjakvøldið.**

BYGDALEIÐIR
*Áki Bertholdsen*

Bussførarnir í Suðuroynni fara ikki at góðtaka sáttmálan um koyring hjá Bygdaleiðum, sum Bussfelagið og Strandferðslan samdust um fríggjakvøldið.

Fríggjakvøldið samdust partarnir um at sáttmálin, sum nú er í gildið, skal vera í gildið í eitt ár afturat. Spurningurin skal tó leggjast fyri limirnar í Bussfelagnum at taka endaliga støðu til.

Men tað er longu nú greitt, at sama, hvørja støðu Bussfelagið kemur til, verður koyringin hjá broytingar í sáttmálanum fyri Strandferðsluna og teir fara at bíða, til Strandferðslan hevur svarað. So verður støða tikin útfrá tí.

## Hvílitíð og høgri løn

Hann sigur, at nøkur av krøvunum, sum bussførararnir í Suðuroynni hava sett fram, er, at reglur um hvílítíð verða settar í gildið og at lønin kemur upp á sama støðið, sum lønin hja bussførarunum í Havn.

Uni Mortensen sigur, at bussførarar hjá Strandferðsluni munnu vera einasti starvsbólkur, sum hevur við flutning at gera, sum ikki hevur reglar um hvílitíð.

Ogtað heldur hann er ein vandi fyri trygdina. Hann vísir m.a. á, at summar dagar fáa bussførarar í Suðuroy bara fýra-fimm tíma svøvn, áðrenn teir aftur skulu til arbeiðis.

– Eitt nú hóskvøld eru summir av okkum ikki lidnir fyrrenn klokkan tvey um náttina, men skulu tørna til aftur klokkan 4.30 um morgunin. Og tað halda vit er ein vansi fyri trygdina.

Hann vísir eisini á, at bussførarar í Havnini fáa munandi hægri løn, enn teir fáa, sum koyra aðrastaðni í landinum.

– Teir fáa í hvussu so er 12% meiri um tíman, tá ið teir koyra, enn vit fáa. Harafturat fáa teir eisini løn ímeðan teir bíða ímillum túrarnar. Vit fáa bara løn ímeðan hjólini rulla, men ta tíðina, vit bíða ímillum túrarnar, fáa vit onki fyri, men mugu betala sjálvir.



*Bussførarnir í Suðuroynni fara ikki at taka koyringina upp aftur, hóast bussførararnir norðanfjørðs góðtaka sáttmálan, sum felag teirra, Bussfelagið, og Strandferðslan, gjørdu fríggjakvøldið.*

Bygdaleiðum í Suðuroynni ikki tikin uppaftur.

Uni Mortensen, talsmaður hjá teimum sjey bussførarunum í Suðuroy, sum eru í verkfalli, sigur, at teir taka í hvussu so er ikki undir, at sáttmálin sum er, bara verður longdur eitt ár afturat, hóast onkrar smávegis ábøtir eru gjørdar.

So koyringin hjá bygdaleiðum í Suðuroy verður ikki tikin uppaftur, hóast endaliga niðurstøðan hjá bussførarunum norðanfjørð verður at góðtaka, at sáttmálin, sum felag teirra og Strandferðslan samdust um fríggjakvøldið, skal galda eitt ár afturat.

Hann sigur, at bussførararnir í Suðuroynni hava lagt nøkur uppskot til


*Børnini í Gøtu skúla hava gjørt eitt modell av bygdini sum hon sá út í víkingatíðini*

# Í Gøtu ein dag

**Skúlabørnini í Gøtu Skúla sýndu fyri jól fram úrslitið av evnisviku, tey høvdu havt í samband við 1.000 ára haldið**

Skúlagongdin í Gøtu Skúla var øðrvísi seinastu vikuna fyri jól, enn hon vanliga plagar at vera. Hesa vikuna høvdu børnini ikki undirvísing í skúlastovuni, men høvdu eina evnisviku í samband við 1.000 ára haldið, sum var við at enda.

Børnini arbeiddu í bólkum við at gera ymiskt, sum sýnast skuldi fram, áðrenn farið varð í jólafrí. Framsýningin var partur av jólahaldi skúlans, sum hesaferð varð skipað eitt sindur øðrvísi, enn gjørt hevur verið hini árini.

Yngru flokkarnir, frá fyrsta til fjórða flokk, arbeiddu saman í einum bólki. Tey høvdu sum evni at royna at ímynda sær, hvussu ein landsnámsbygd hevur sæð út í Føroyum um ár 1.000. Og rímiligt varð Gøta vald. Gøta er jú kend úr Føroyingasøguheilt aftur í víkingaøldina.

Ymiskt var, sum gerast kundi burtur úr. Eitt nú at royna at mynda ein bóndagarð í víkingatíð. Og í samband við kristnanina varð eisini gjørt eitt sindur burtur úr teirri hendingini í Føroyingasøgu, tá Tróndur í Gøtu varð kristnaður. Ikki var tað eftir egnum vilja ella við nakrari beinleiðis persónligari frelsu, at tað hendi, sum Føroyingasøga sigur frá.

Í hesum sambandi varð eisini komið inn á kreddu - ella trúarjáttan - Tróndar. Hon er til enn, og stendur í Sálmabókini nr. 315 í týðing til okkara mál, sum Mikkjal á Ryggi hevur gjørt.

Hesin bólkurin gjørdi eisini nakað burtur úr søguni gjøgnum kvæðini. Myndir vórðu gjørdar til Sigmundakvæði yngra. Umframt at tey eisini gjørdu burtur úr at lýsa guðshúsini í Gøtu. Tað vil siga kirkjur og samkomuhús, eins og gamla býlingin í Norðragøtu.

Eldru flokkarnir arbeiddu hvør sær. Fimti flokkur skrivaði leikrit og gjørdi búnar og leiktjøld til sjónleik úr Føroyingasøgu, sum tey settu upp.

Sætti flokkur hevði ættargransking. Og tað var ikki hvør sum helst, sum granskaður varð. Tað var ættina hjá Gøtuskeggjum, tey fóru at kanna, eins og tey høvdu eina bíbliuframsýning.

Sjeyndi flokkur var kanska eitt sindur nærri okkara tíð. Tey arbeiddu við staðarnøvnum í Gøtu. Eisini gjørdu tey samrøður við eldri gøtufólk um siðir og skikkir. Hesar samrøður vórðu tiknar á film.

**ej**


*Til framsýningina høvdu børnini gjørt nøkur víkingahús*



# Kirkjubømúrurin á borðið aftur

**– Eg vóni og vænti, at málið verður loyst rímuliga skjótt, soleiðis at farast kann undir varðveitingararbeiðið av Múrinum í summar, sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum**

KIRKJUBØMÚRURIN
*Turið Kjølbro*

Hann spøkir javnan, Kirkjubømúrurin, og í gjár kom hann aftur á landsstýrisborð. Landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, ætlar sum so nógvir aðrir undanfarnir í hansara sessi at loysa málið eina ferð med alla.

– Málið er ógvuliga trupult, men eg havi sett mær fyri at loysa tað. Nógv ymisk áhugamál gera málið sera fløkt, men tann størsti trupulleikin er, at einki er gjørt í málinum, serliga frá myndugleikanna síðu. Av teirri orsøk, at fornmyndugleikarnir einki hava gjørt, tóku nøkur fólk seg saman at gera eina ætlan um, hvat skal henda við Múrinum, sum eg rokni við líka nógv var ein provokasjón, tí einki hendi. Eg rokni ikki við, at hesi fólk hava hildið, at tann ætlanin var tann endaligi sannleikin. Heldur var tað fyri at seta málið á landakortið aftur, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Landsstýrismaðurin í mentamálum vil ikki siga nakað nærri um, hvat hann heldur um uppskotið, sum á sinni kom frá J. P. Gregoriussen og kirkjubøarfólki um innilokan av Múrinum.

– Øll hugskot kunnu brúkast í eini samlaðari meting, sigur hann.

## Samtyktin galdandi

Uttan mun til, hvørji hugskot koma á borðið, nú Múrurin í Kirkjubø enn eina ferð er komin á borðið, er samtyktin, sum Ivan Johannesen, ið var landsstýrismaður í mentamálum undanfarna valskeið, framvegis galdandi. Og hon sigur, at Múrurin er eitt fornminni, og ikki ein brúkslutur. Samtykt varð, at farast skuldi undir varðveitingararbeiði av Múrinum, ið inniber, at partar av Múrinum verða innilokaðir í nøkur ár, soleiðis at Múrurin verður turkaður og harvið niðurbraðingin steðgar.

– Tann samtyktin er framvegis galdandi. Nú málið er fyri aftur, fara vit at kanna, hvar vit standa, hvussu langt vit kunnu koma og ikki minst hoyra ymsu sjónarmiðini í málinum, soleiðis at vit finna eina loysn.

## Skera ígjøgnum

Skal málið um Múrin loysast, skal myndugleikin á staðnum, tað vil siga Kirkjubøarsóknar bygdaráð, vera inni í myndini. Síðani Tórbjørn Jacobsen tók við sum landsstýrismaður fyri sløkum hálvum ári síðani, hevur hann tosað við lokala myndugleikan.

– Eg vóni og vænti, at málið verður loyst rímuliga skjótt, soleiðis at farast kann undir varðveitingararbeiðið í summar. Pengar eru jú settir av til endamálið. Men einki verður gjørt uttan, at bygdaráðið í Kirkjubøar sókn verður eftirspurt. Hvussu stóran løgfrøðiligan myndugleika tey hava í málinum, veit eg ikki, men tey hava í øllum førum ein moralskan myndugleika í og við, at tey hava livað so tætt upp at Múrinum í so nógv hundrað ár. Tað kann eingin uttan víðari síggja burtur frá. Sum støðan er í løtuni eiga tey Múrin í og við, at hann er partur av festinum hjá bóndanum í Kirkjubø, men hinvegin hava tey ikki rætt at gera tað sum tey vilja við hann. Vísir tað seg, at tey fólkini, ið eru partar av málinum, ikki hava loyst tað innan eina rímuliga tíð, skeri eg ígjøgnum, soleiðis at endi fæst á tí. Tað skal í øllum førum verða loyst í míni tíð sum landsstýrismaður.


*- Verður málið um Múrin í Kirkjubø ikki loyst skjótt, er vandi fyri, at hann fer at rapa. Tað skal í øllum førum verða loyst í míni tíð sum landsstýrismaður, sigur Tórbjørn Jacobsen, lansstýrismaður í mentamálum*


*Verður tað sum landsstýrismaðurin í mentamálum vil, verður farið undir varðveitingararbeiðið av Múrinum í summar*

# Maskinmeistarafelagið fingið nýggjan formann

TÍÐINDAKSRIV
*Maskinmeistarafelagið*

Finnleif Guttesen, sum hevur tikið við starvinum sum borgarstjóri á Tvøroyri, er nú farin frá sum formaður og nevndarlimur í Maskinmeistarafelagnum.

Á nevndarfundi leygardagin skipaði nevndin seg av nýggjum við Niels Th. Pedersen sum formanni og Zacharias Zachariasen sum næstformanni. Tumas Eli Høj Joensen, sum hevur verið tiltakslimur, er nú nevndarlimur.

Maskinmeistarafelagið hevur aðalfund í mars mánaða og tá verður m. a. formansval á skránni.

Á fundinum leygardagin viðgjørdi nevndin í Maskinmeistarafelagnum eisini tey úttalilsir, sum formaðurin í felagnum rækjuskip hevði í útvarpinum seinasta fríggjakvøld. Hann segði m. a. at Maskinmeistarafelagið hevði verið serliga víðgongt í sínum krøvum.

Av øllum manningarfeløgunum var tað einans Maskinmeistarafelagið, sum segði sáttmálan upp hesu ferð. Hetta var av teirri einfaldu orsøk, at tað hevur víst seg at vera ógjørligt at fáa nakrar broytingar og dagføringar í sáttmálaskeiðnum.

Maskinmeistarafelagið er einasta manningarfelag, sum hevur ynskt eina fastlønarskipan við einari skipaðari fríðtíð og hetta hevur við tíðini eisini vunnið frama hjá fleiri reiðaríum.

Tá ið Maskinmeistarafelagið og Føroya Reiðarafelag nú settust við samráðingarborðið vísti tað seg, at krøvini frá Maskinmeistarafelagnum vóru so mikið rímulig, at tað skuldu bert tveir stuttir fundir til so vóru partarnir so gott sum samdir.

Okkum kunnugt er Jákup Egholm Hansen eisini limur í Føroya Reiðarafelag, so vit kunnu mæla honum til, at seta seg í samband við sítt felag fyri at frætta um samráðingarnar við Maskinmeistarafelagið.

Tað er hugstoytt, at einstakir reiðarar ikki enn hava skilt, at tíðin við 4-6 mánaða útmynstring er farin, men hesir skulu so ikki rokna við, at nakar í longdini fer at góðtaka slíkt.